## Færri flóttafólk

Tað komu munandi færri flóttafólk úr Afrika við báti um Miðjarðarhavið til Spania í fjør enn árið fyri. Spanski innanríkisráðharrin, Alfredo Perez Rubalcaba, sigur, at talið var heili 45 prosent minni í fjør. Sponsku myndugleikarnir skrásettu í fjør umleið 7.300 ólóglig flóttafólk úr Afrika. Tað almenna talið í 2008 var oman fyri 13.000, sigur ráðharrin. Hann heldur, at betri eftirlit hevur fingið nógvar afrikanarar at sleppa ætlanini um at fara um Miðjarðarhavið, og harafturat hevur búsksparkreppan við veksandi arbeiðsloysi fingið fleiri at setast aftur, sigur hann.



# Kvarta millión fyri eina uppliving

**Landsstýrið nýtti 242.492 krónur og 20 oyru á COP15 ráðstevnuni í Keypmannahavn. – Tað var eitt upplivilsi fyri lívið, segði Kaj Leo Johannesen, løgmaður, beint eftir ráðstevnuna**



*Kaj Leo Johannesen, løgmaður, hitti Gordon Brown, forsetisráðharra, á COP15 ráðstevnuni í Keypmannahavn. Hetta upplivilsi kostaði landskassanum meira enn 125.000 krónur. Annika Olsen, landsstýriskvinna, var eitt sindur aftanfyri løgmann í nýtslu, hóast hon luttók á nærum allari ráðstevnuni*

COP15
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Fyri júst einum mánaði síðan endaði COP15 veðurlagsráðstevnan í Keypmannahavn. Veruliga úrslitið var so sum so, men vón var alla tíð fyri, at okkurt kundi spyrjast burturúr.

Føroyar vóru eisini umboðaðar á ráðstevnuni. Løgmansskrivstovan, Innlendismálaráðið, Uttanríkisráðið og Vinnumálaráðið vóru farin mannsterk avstað.

Málið var alla tíð greitt: Føroyar skuldu nevnast í eini møguligari avtalu.

Ongin avtala kom, og hevði ein avtala verið, høvdu Føroyar helst ikki verið nevndar.

Tá løgmaður eftir ráðstevnuna varð spurdur, hvat hann fekk burtur úr COP15, var svarið greitt.

– Tað var eitt upplivilsi fyri lívið. Tað var sera áhugavert og læruríkt at síggja, hvussu ymiskar avbjóðingar ríkisleiðarar hava, staðfesti Kaj Leo Johannesen.

Og løgmaður legði afturat, at hann heldur tað vera sera týdningarmikið, at politikarar sleppa út at síggja, hvørjar avbjóðingar aðrir politikarar úti í heimi hava.

### Løgmaður nýtti mest

Men hetta upplivilsi fyri lívið hjá Kaj Leo Johannesen og øðrum av Løgmansskrivstovuni kostaði eisini skattgjaldarunum.

Ætlanin var, at løgmaður skuldi luttaka í 12 dagar á ráðstevnuni, og Løgmansskrivstovan hevði funnið fram til, at tað skuldi kosta 125.000 krónur at senda løgmann og trý onnur á Løgmannskrivstovuni.

Fíggjarlógin kom tó ikki upp á pláss, og tí endaði tað við, at løgmaður bert luttók á ráðstevnuni í tveir dagar, og tá endaligu rokningarnar komu var úrslitið, at Løgmanskrivstovan hevði nýtt 126.215 krónur og 20 oyru.

Altso meira enn ætlað í nógv styttri tíð.

### Annika trýsti danir

Landsstýriskvinnan við Innlendismálum fór við fylgi til Keypmannahavnar við málinum at fáa Føroyar nevndar í eini møguligari avtalu.

Dagarnir á COP15 ráðstevnuni gingu, og Dimmalætting, ið var einasti føroyski tíðindamiðil, sum luttók inni í Bellasentrinum, staðfesti við yvirskrift mánadagin 14. desembur at, »Annika roynir at trýsta danir«, so Føroyar kundu nevnast í avtaluni, og eftir hetta fekk Annika Olsen nógv pláss í Føroysku miðlunum, har tað gjørdist alsamt greiðari, at tað gekk striltið at fáa Føroyar nevndar í eini møguligari avtalu.

Og tá alt var liðugt í Bellasentrinum bar Innlendismálaráðið seinastu tíðindini frá COP15 ráðstevnuni.

»Ein hendingaríkur COP15-fundur«, har fegnast var um góða samstarvið við Lykke Friis, veðurlagsog orkumálaráðharra, men ikki eitt orð, um Føroyar høvdu verið nevndar, um ein avtala kom.

Men Annika Olsen, landsstýriskvinna, og Anni á Hædd, deildarleiðari, luttóku á ráðstevnuni í næstan allar dagarnar, hon vardi, so tað kemur kanska ikki óvart á, at Annika Olsen við 50.650 krónum er beint aftanfyri Kaj Leo Johannesen í kostnaði fyri COP15.

### Marknaðarføra Føroyar

- Ráðstevnan er eitt gott høvi at seta Føroyar á heimskortið. Í hesum sambandi hevur Uttanríkisráðið samstarvað við danskar myndugleikar um at marknaðarføra Føroyar á COP15, skrivaði Uttanríkiráðið í tíðindaskrivi um luttøkuna.

Og tað kostar ikki onki hjá Uttanríkisráðnum at marknaðarføra Føroyar í Danmark.

37.635 krónur brúktu tvey embætisfólk hjá Uttanríkisráðnum á túrinum í Danmark.

Uttanríkisráðið megnaði eisini at marknaðarføra seg sjálvt í Føroyum, har tað millum annað í skrivi staðfesti, at undir setanarhaldinum sang føroysk kvinna, og at Uttanríkisráðið – saman við Indonesia, Noregi, FAO og Norðurlenska Ráðharraráðnum – skipaði fyri tiltaki undir heitinum Seas the Future.

Jørgen Niclassen, landsstýrismaður í Uttanríkismálum, luttók ikki á COP15.

### Johan Dahl vitjaði Dong

Umframt løgmann og landsstýrisfólkini í uttanríkismálum og innlendismálum, luttók Johan Dahl, landsstýrismaður við Vinnumálum eisini.

Johan Dahl var tó ongantíð nærindis Bella sentrinum, tí hann og ein embætismaður vóru á vitjan hjá Dong, har millum annað var tosað um Grana-verkætlanina.

Hetta kostaði landskassanum 27.692 krónur.

### Triðingur av heimahjálpsparing

Hyggja vit at samlaðu mongdini av nýttum peningi hjá teimum 10, sum umboðaðu landsstýrið, gevur tað slakar 250.000 krónur.

Samanbera vit hetta við tað, sum fáast skal inn afturat við at hækka gjøldini fyri heimahjálp og at lækka loftið hjá pensjónistum, sum vinna pening, áðrenn teir skulu rinda fyri heimahjálp, sum ætlandi skal geva landinum eina meirinntøku á 600.000 krónur. So kunnu vit staðfesta, at landsstýrið brúkti meira enn ein triðing av tí, sum pensjónistar skulu rinda inn afturat fyri heimahjálp á COP15 ráðstevnuni, sum løgmaður kallar fyri eitt upplivilsi fyri lívið, og Innlendismálaráðið kallar fyri ein hendingaríkan fund.